# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk



Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**John Simonsen**
(John á Gørðum)
Klaksvík

varð sjúkur og flutti heim til Harran.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Malta í Hirtshals. Tøkk fyri vitjan og fyri troystarík orð í kapellinum, í Betesda og við grøvina. Tøkk tit, ið fylgdu og tøkk fyri fløvandi hendur, ið hjálptu.

Eisini ein tøkk til Klaksvíkar Sjúkrahús fyri teir seinastu mánaðirnar, tá John skifti ímillum heimið og sjúkrahússongina og fyri ta altíð vinsælu og professionellu móttøku og viðferð, hann og vit avvarðandi møttu, tá harðast leikaði á.

Nógvir av vinunum hjá Bodil og John eru ikki meira. Tó verður ein tøkk send øllum, sum teimum ígjøgnum eitt langt lív untist at ferðast saman við, bæði heima, í arbeiði og í samkomuhøpi. Heim teirra var eitt heim við nógvum lívi, og teimum dámdi at vera gestablíð. Húsið við Garðavegin – eitt trygt støði í gleði og sorg – stendur enn, men heimið hjá Bodil og John, við sínum eginleikum er ikki meir.

*Við tøkk vegna foreldur okkara og familjuna*
**Jógvan, Kjartan, Anna, Elisabeth og Unn**

*. . . fyri ásjón Hansara varð skrivað minnisbók um tey, sum óttast HARRAN og hugsa um navn Hansara. Og tann dag Eg útinni verk mítt – sigur Harrin Gud herskaranna – skulu tey vera ogn Mín . . .*
(Mal. 3,16-17).

**Dagurin**

**4. mars. Adrianus,** deyður umleið ár 300. Keisarligur rómverskur embætismaður sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum. Navnið merkir maður úr Adria í Norðuritaliu. Navn á fleiri keisarum. Magnus Heinason føddur hendan dagin í 1545.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Skúlabygging í Marknagili

**Ætlanirnar um at leggja fleiri skúlar saman í Marknagili í Havn eru ikki nýggjar, tað vísir ein grein í myndablaðnum Eygað í 1974**

SKÚLAR

Nú arbeitt verður við ítøkiligum ætlanum um at byggja nýggjan tekniskan skúla, handilsskúla og studentaskúla í Marknagili, er tað áhugavert at síggja at fyri umleið 35 árum síðan, meðan skúlaheimið í Marknagili var í gerð, vóru eisini stórar ætlanir við skúlabygging har á staðnum.

Í myndablaðnum Eygað fyri mars 1974 er ein myndafrásøgn frá gamla skúlaheiminum hjá Tekniska skúla í Kongagøtu. Í greinini stendur m.a. "Í Marknagili er pláss fyri fleiri skúlum, og menn samráðast dúgliga um samanlegging av maskinskúla, tekniskum skúla og handilsskúla. Tað er einki at ivast í, at har sum nýggja skúlaheimið verður bygt, kemur einaferð at standa ein meginskúli".

*Kelda: Myndablaðið Eygað 1974*



*Nýggja skúlaheimið í Marknagili undir bygging*



*Skúlaheimið sum var í Kongagøtu*



*Fyrrverandi fyristøðufólkini á skúlaheiminum, Frida og Helgi Øster*



*Næmingar skaffa á gamla skúlaheiminum f.v.: Erhard Miðgerð úr Fuglafirði, Magnus Jacobsen úr Vági, Andrew Leo úr Porkeri, Mikkjal Lervig úr Leirvík og Helgi Øster, fyristøðumaður*